# l framleiðsla standa seg best



*Eftir framløgurnar hjá Bjarna Poulsen um gongdina hjá fiskiskipaflotanum og fiskavirkisvinnuni, var orðaskifti*
Mynd: Jens Kr. Vang

støddarskilja. Tey størru virkini vilja ikki hava fiskin støddarskildan, men kanska tey smærru virkini vilja, segði hann.

Edmund Jacobsen, sum starvast í Føroya Banka, helt, at verður fiskurin skildur umborð, spara reiðarí og manning eitt lið á landi, og tí helt hann, at meira skuldi ligið eftir í prísinum.

- Men tað ger tað ikki kortini. Vit fáa ikki meira fyri fiskin við skiljing, staðfesti Ragnar Olsen, reiðari.

Anfinn Olsen segði, at støddarskiljing er við at gerast "gandaorð" í fiskivinnuhøpi.

- Men hetta trúgvi eg einki upp á, segði hann.

Hann visti annars at siga, at íslendingar hava økt munandi um loftvegis flutningin av fiski millum Keflavík og Boston í USA síðan yvirgangsatsóknirnar hin 11. september, tá ið flúgvingin millum Evropu og USA minkaði.

## Upsi virkast umborð

Spurningurin um virking av eitt nú upsa umborð á skipunum heldur enn í landi, nú trupult serliga er at sleppa av við og fáa prís fyri upsa, var eisini frammi.

Tað var Leivur Mohr, fyrrverandi virkisleiðari og sum í fleiri ár hevur starvast á vinnulívsdeildini hjá Føroya Banka, sum reisti spurningin, um møguleikar eru at virka upsa umborð.

- Er tað ein møguleiki at fara út á sjógv at arbeiða upsa? spurdi hann.

Olaf Olsen var ikki sannførdur um, at hetta er ein gongd leið.

- Skal upsin arbeiðast umborð, er í fyrsta lagi neyðugt við nýggjum íløgum, og tað er dýrari at gera verksmiðju umborð enn í landi.

Fyrrverandi reiðarin á Beta visti annars at siga, at nýggju skipini eru nógv effektivari í veiði enn tey gomlu.

- Tey eru effektivari, enn vit trúðu, segði hann.

## Afturútsiglt sølulið

Ragnar Olsen helt, at Føroyar eru afturútsigldar í søluliðnum í mun til okkara grannalond.

- Eg kundi eisini hugsað mær, at meira kundi verið gjørt við at fingið betri prís fyri vøruna, men hetta veit eg ikki, segði Olaf Olsen.

Onkur, sum var við á fundinum, helt fyri, at kann vøran ikki seljast betur, megna virkini kanska at varðveita skiftisavlopið við at "klípa" burtur av fiskaprísinum.

Eftir at Bjarni Poulsen hevði havt sínar framløgur av gongdini hjá fiskiskipaflotanum og var farin undir at talgreina gongdina í fiskavirkisvinnuni, gjørdi Olaf Olsen sær eina áhugaverda niðurstøðu.

Tað vísir seg nevniliga, at tað eru línuskipini, ið teljast millum tey elstu skipini í flotanum, sum av ísfiskaskipunum hava tey bestu úrslitini seinastu árini, og samstundis er tað saltfiskaframleiðslan, sum í Føroyum er ein hin elsta, ið hevur bestu úrslitini á landi.

- Hetta merkir, segði Olaf Olsen, at tað eru tey elstu skipini og tann elsta framleiðslan, sum standa seg best.




*- Skal upsin arbeiðast umborð, er í fyrsta lagi neyðugt við nýggjum íløgum, og tað er dýrari at gera verksmiðju umborð enn í landi, segði Olaf Olsen*
Mynd: Vilmund Jacobsen